umhvørvisstovan

KUNOYAR KOMMUNA

780 KUNOY
FØROYAR

Argir hin 27. september 2011
Málsnr.: 11/00011-9
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlanin góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 27.09.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Kunoyar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 14.09.2011 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 10/00011-4). Ætlanin er gjørd av Spf. Sámal Johannesen, ráðgevandi verkfrøðingum, og hevur Kunoyar kommuna á kommunustýrisfundi tann 31. august 2011 samtykt ætlanina. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við Spf. Sámal Johannensen, har biðið varð um at fáa summi viðurskiftir lýst nærri, og 27.09.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 10/00011-8).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini, ið varð send 22.09.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

umhvørvisstovan Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober
1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd. Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn

Spf. Sámal Johannesen, Geilin 22, FO-700 Klaksvík